

Hjartaliga takka vit og foreldur okkara øllum tykkum, ið mintust okkum á konfirmatiónsdegnum 9. apríl.
**Heilsan Rakul og Ólavur Hauritz**



**Góða Barbara**
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum tann 17. Vónandi fært tú ein góðan dag.
**Heilsan mamma og pabba, Kristian, Silja, Anna og Elsa**



**Elskaða Emma Michala**
So verður prinsessan hjá mammu og babba 2 ár 18. sept. Hjartaliga tillukku við degnum.
**Ynskja Ingrid og Sergio**



**Til Eimee ommu**
Góða kona, mamma, vermamma, omma og langomma. Hjartaliga tillukku við 65 ára degnum 16. sept. Takk fyri alt tú ert fyri okkum og Harrans signing í framtíðini.
**Heilsan vit øll**



**Miss Fútalág!!!**
Tillukku við teimum 30 árunum. Vit síggjast í Fútalág 14 leygarkvøldið.
**Heilsan venindurnar**



**Hey góða fitta Elisabeth**
Ja, ballini vóru góð tá vit gingu á Handilsskúla. Men nú er tap títt tørn at hava ball. Vit síggjast í Fútalág 14. Tillukku við teimum 30 árunum.
**Heilsan vit tú veit**



Til tykkum tríggjar sum hava rundar føðingardagar í august, september og oktober. Hjartaliga tillukku.



**Erla og Aron**
Góðu tit bæði. Mostur og Tummas abbi ynskja tykkum tillukku við føðingardøgunum 16. sept. Ja nú eru tit stór, 5 og 4 ár. Vónandi fáa tit nógvar pakkar. gumma og Martin lata heilsa.
**Mostur og Tummas abbi**



**R-E-S-P-E-C-T**
Find out what it means to me lalalala... Tillukku góða.
**Heilsan vit genturnar**



**Góða Elisabeth**
Ja, nú er kom dagurin, 30 ár. Hjartaliga tillukku. Vit gleða okkum til ballið leygarkvøldið.
**Ynskja gellurnar**



**Hendan gentan verður 30 ár**
Og enn hevur hon ikki funnið tann einasta eina. Hon er single, so dreingir – fari í gongd. Tillukku góða.
**Heilsan vinkonurnar**



**Girls just wanna have fun yeaahh!**
Tað verður eitt lív leygarkvøldið í Fútalág. Tillukku tillukku.
**Ynskja vit á kortinum**



**Hey góða Elisabeth**
Hevði tú væntað hetta? Hasin túrurin við Norrønu var super duper. Tillukku við teimum 30 árunum.
**Ynskja vit sum vóru við Norrønu**



**Elisabeth er 30 ár!**
Leygardagin verður brakið. Vit síggjast. Ert tú kløkk.
**Heilsan vit sum troppa upp**

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




Redaktiónsleiðari
-Vilt tú vera við til at mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum saman við blaðstjóranum skal leggja til rættis framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella royndir innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu innan 16. oktober senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:

Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo. Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*